# Nú stendur á

**Fleiri eru longu nú ávegis fjórðingsfinalunum í steypakappingini, men hjá eitt nú B36 og KÍ stendur heilt nógv á, tó at talan á pappírinum er um yvirkomiliga mótstøðu**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Triðja umfarið í steypakappingini stendur nú fyri framman, og í ymsu bólkunum er støðan hjá liðunum nú so smátt farin at tekna seg. Nøkur teirra eru mest sum longu nú komin við í fjórðingsfinaluna, meðan tað hjá øðrum als ikki hevur skorist so væl, sum roknað varð við undan kappingini.

### Svangir vágamenn

Í bólki eitt teljast vágamenn avgjørt millum teirra, sum høvdu vonir um størri úrtøku, enn veruleikin sigur. Gaman í hevur talan verið um tveir truplar útidystir í Runavík og á Toftum, men talan var í báðum førum um tepur tap, og hetta kann so endurtaka seg móti TB, um vágamenn ætla sær sess víðari í kappingini. TB má í øllum førum metast sum veikasta liðið í bólkinum, men teir hava longu tikið stig frá B68, og spurningurin er tí, hvussu lættir teir eru at syfta hóast alt.

Hin dysturin í bólkinum er ímillum NSÍ og B68. Steypavinnararnir frá í fjør hava vunnið teir báðar fyrstu dystirnar, og við einum sigri her kunnu teir sópa allan iva til vist í spurninginum, hvørt teir skulu víðari ella ikki. Toftamenn hava hinvegin mist tvey stig, og tí skulu teir helst fáa okkurt burtur úr her, tó at tað fyri teirra viðkomandi ikki er nøkur katastrofa, um talan verður um eitt tap.

### Oddadystur á Eiði

Í bólki tvey hevur EB/Streymur higartil verið positiva elementið, og við fullum stigatali fyri tveir dystir hava teir longu stungið sínar ætlanir út í kortið. Tað hava vágbingarnir sum so eisini, men hjá teimum kom tað heldur dátt við, at KÍ skuldi javna í illveðrinum seinasta vikuskifti.

Dysturin á Eiði líkist mest av øllum eina uppgerð um, hvat lið skal enda ovast í bólkinum, og við útlitinum fyri heimavølli í fjórðingsfinaluni er tí einki at ivast í, at báðir partar fara at leggja nógv fyri.

Klaksvíkingar fingu sum kunnugt annað stigið við sær úr Vági, og einki er at ivast í, at hetta kom væl við. Í øllum førum reinsaði hetta nakað av svíðandi tapinum frá fyrsta dystinum av leikarunum, og og tí man sjálvsálitið vera kvinkað nakað uppeftir, tá AB kemur á vitjan. Argjamenn hava higartil tapt tepurt í tveimum heimadystum, og megna teir eitt líkinda úrslit í Klaksvík, gevur hetta í øllum førum ábendingar um, hvar liðið ætlar sær at spæla komandi ár.

### Trýst á B36

Seinasti bólkurin er bólkur trý, har HB og GÍ longu hava seks stig, og tí eru heilt nær einari fjórðingsfinalu. Vanliga er talan ikki um keðiligar dystir, tá hesi hittast í Sarpisgerði, og dysturin hesa ferð verður neyvan nakað undantak. Samstundis er hetta ivaleyst eisini eitt gott høvi at meta um, hvussu væl liðini eru fyri til árið, tó at tað enn er nakað eftir, áðrenn sjálv landskappingin byrjar.

Hini bæði liðini í bólkinum eru framvegis stigaleys, og serliga hjá B36 man hetta kennast tungt. Nógv varð annars roknað av liðnum, men fyrst og fremst hava skaðar sett sínar forðingar fyri, men hetta eru ikki ráð at hugsa um leygardagin. Her er kravið heilt einfalt trý stig, og um ikki kann talan lættliga gerast um farvæl til steypakappingina, longu áðrenn hon av álvara kom ígongd.



*Vanliga er talan ikki um keðiligar dystir, tá GÍ og HB hittast, og dysturin hesa ferð verður neyvan nakað undantak í so máta*

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 7 | 2 | 5 | 6 |
| 2 | B68 | 2 | 1 - 1 - 0 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 3 | TB | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 4 | FSV | 2 | 0 - 0 - 2 | 4 | 7 | -3 | 0 |

**Bólkur 2**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 0 | 5 | 6 |
| 2 | VB | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 3 | KÍ | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 5 | -4 | 1 |
| 4 | AB | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 3 | -2 | 0 |

**Bólkur 3**

| | | dystir | v - j - t | mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 2 | 2 - 0 - 0 | 9 | 1 | 8 | 6 |
| 2 | GÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 6 |
| 3 | B36 | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |
| 4 | Skála | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 11 | -9 | 0 |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 10 | 9 - 1 - 0 | 575 | 459 | 116 | 28 |
| 2 | VÍF | 11 | 7 - 2 - 2 | 538 | 448 | 90 | 24 |
| 3 | Stjørnan | 11 | 4 - 1 - 6 | 506 | 505 | 1 | 17 |
| 4 | StÍF | 10 | 5 - 1 - 4 | 522 | 533 | -11 | 17 |
| 5 | Kyndil | 10 | 3 - 1 - 6 | 533 | 549 | -16 | 13 |
| 6 | Neistin | 10 | 4 - 0 - 6 | 455 | 487 | -32 | 13 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 1 - 0 - 9 | 416 | 564 | -148 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 8 - 0 - 3 | 722 | 608 | 114 | 25 |
| 2 | StÍF | 10 | 7 - 2 - 1 | 646 | 559 | 87 | 25 |
| 3 | Kyndil | 10 | 7 - 2 - 1 | 614 | 571 | 43 | 22 |
| 4 | Neistin | 10 | 4 - 1 - 5 | 619 | 593 | 26 | 18 |
| 5 | KÍF | 11 | 2 - 2 - 7 | 617 | 657 | -40 | 11 |
| 6 | H71 | 10 | 4 - 0 - 6 | 563 | 652 | -89 | 11 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 0 - 1 - 9 | 554 | 695 | -141 | 4 |

# Lítið upp á seg

**Hóast Neistin kanska kann órógva fyrireikingarnar hjá StÍF nakað, so tykist stórvegis spenningur ikki at valda um mansdystirnar um vikuskiftið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast fult umfar er í landskappingini hjá monnum um vikuskiftið, so telir tað ikki rættiliga við. Tað er eins og halda øll ondini í spenninginum um komandi vikuskiftið, tá FM-heitið verður avgjørt, og so má restin bara bíða.

Av dystunum hetta vikuskiftið er tað í veruleikanum bert tann í Havn, sum hevur nakað at siga. Kyndil hevur nevnliga framvegis møguleika at ogna sær silvurmerkini á seinasta leikdegi, men so krevur tað fyrst og fremst, at teir vinna sítt. Og lítið er at ivast í, at móti Tjaldri eru teir í øllum førum stórfavorittar.

Á Skála hitar StÍF upp til gulldystin við at taka ímóti Neistanum, og tó at talan á pappírinum ikki er um lætta mótstøðu, so er einki at ivast í, at strandingar eru favorittarnir. Sálarliga tóktust neistamenn eisini at vera farnir í summarfrí, tá teir taptu greitt fyri VÍF, og spurningurin er, hvussu langt upp teir kunnu sveiggja seg hesaferð.

Seinasti dysturin er í Hoyvíkarhøllini, har sambúgvarnir, H71 og KÍF skulu gera av, hvør teirra skal av næst niðasta sessinum. Nakran favoritt er trupult at peika á her, tí seinastu umførini hava bæði liðini greitt sýnt, at fyri teirra viðkomandi er árið liðugt. Spurningurin í so máta verður tí helst, hvat av liðunum spælir minst vánaligt hendan dagin.





*Í fjør gjørdust ávíkavist Anna Müller Jacobsen og Rúni Weihe ársins leikarar í flogbólti, og tey hava eisini bæði møguleika at fáa okkurt steypið nú leygarkvøldið, tá tey bestu enn einaferð skulu finnast*

# Flogbóltsveitsla

**Aftur í ár verður gallakvøldið hjá flogbóltinum hildið á Hotel Føroyum, og sjálvsagt skulu tey bestu av teimum bestu finnast her**

FLOGBÓLTSGALLA
*Jákup Mørk*

Leygarkvøldið verður tað, at endaligt punktum verður sett fyri flogbóltinum fyri nú lidna kappingarárið. Seinasta kappingin var sum vant tann á Giljanesi, og nú er so stundin komin, har leikararnir fara at hittast undir meira óformligum umstøðum.

Eins og í fjør, so verður gallaveitslan hildin á Hotel Føroyum, og tað er einki at ivast í, at ein rúgvu av teimum leikarum, sum í ár hava sett sín dám á kappingina, fara at taka lut í kvøldinum, sum vanliga plagar at vera eitt hóskandi punktum fyri øllum. Gjøgnum mongu dystirnar hava leikararnir sjálvandi lært hvønn annan at kenna, men tá hetta verður gjørt í slíkum høpi, er talan tó um heilt aðra samveru. Taptir og vunnir dystir verða heilt víst millum evnini, sum prátað verður um, men hartil verða stundirnar eisini til so mangt annað enn tað, sum bara fyriferst á vøllinum.

### Ársins bestu

Eitt er tó, sum hevur við spælið á vøllinum at gera. Høddarpunktið á slíkum gallakvøldum er sjálvandi, tá bestu leikararnir á árinum skulu kjósast, og soleiðis verður eisini í ár. Atkvøðugreiðslan í ár hevur tó verið nakað øðrvísi, tí útlendsku leikararnir eru bólkaðir fyri seg.

Rasisma hevur verið nevnt um hetta aðra staðni, men frá flogbóltssambandinum verður ført fram, at talan sum so bert er um at seta meira fokus á heimligu leikararnar, tí hesi annars ofta hava lyndi til at drukna í prátinum um dugnaligu útlendsku leikararnar, sum sjálvsagt eisini seta sín dám á kappingarárið.

Heilt við sviðið soð verða útlendingarnir tó ikki. Besti útlendski leikarin skal eisini kjósast, umframt at hópur av øðrum stjørnum eisini skulu finnast. Spenningurin er oftast stórstur um, hvør verður ársins leikari og ikki minst ársins stjørnuskot, men hartil er so eisini talan um onnur, sum fáa eitt herðaklapp. Ársins álopsleikari, blokkleikari, hevari, verjuleikari og sjálvandi venjari skulu finnast, og tað er longu nú greitt, hvørji tey eru, sum fyrst og fremst dystast um heiðrarnar.

Eins og við Oscar-handanunum, so er nevnliga listi við nomineraðum leikarum settur upp fyri hvønn bólkin. Hesir listar framganga aðra staðni á síðuni, og fara vit sum so ikki at gera meira við hetta, fyrr enn í týsdagsblaðnum, tá úrslitið av hesum fyriliggur.

## Tær bestu

**Kandidatar-kvinnur**

Ársins áleypari

| | |
|---|---|
| Anna M. Jacobsen | Mjølnir |
| Gudrid Nolsø | TB |
| Herborg á Mýruni | Dráttur |
| Margit Joensen | Mjølnir |
| Rannvá Dam | KÍF |
| Soley Philbrow | ÍF |
| Tina Jacobsen | Mjølnir |

Ársins blokkleikari

| | |
|---|---|
| Annika Rasmussen | ÍF |
| Ingun Midjord | TB |
| Lena Buð | Mjølnir |
| Miriam Weihe | Dráttur |
| Sóley Philbrow | ÍF |
| Svanna Nielsen | TB |
| Tina Jacobsen | Mjølnir |

Ársins verjuleikari

| | |
|---|---|
| Gudrid Nolsø | TB |
| Harriet Hammer | TB |
| Kristina | Fleyr |
| Margi Joensen | Mjølnir |
| Miriam Weihe | Dráttur |
| Rannvá Dam | KÍF |
| Rønn Eliassen | ÍF |
| Vera Larsen | Mjølnir |

Ársins hevari

| | |
|---|---|
| Angili Johannsen | KÍF |
| Marjun Kalsø | Mjølnir |
| Randi Larsen | ÍF |
| Torgunn Jónsdóttir | Dráttur |

Ársins stjørnuskot

| | |
|---|---|
| Birita Joensen | KÍF |
| Birita Joensen | KÍF |
| Durita Ljósstein | Mjølnir |
| Guðrun Dimon | TB |
| Heidi Dam | KÍF |
| Herbjørg Jøkladal | ÍF |
| Hildigarð Jacobsen | KÍF |
| Ingun Midjord | TB |
| Lena í Buð | Mjølnir |
| Maiken Sigmundsd. | KÍF |
| Rannvá Dam | KÍF |

Ársins leikari

| | |
|---|---|
| Gudrid Nolsøe | TB |
| Elisabeth Rasmussen | Dráttur |
| Heidi Dam | KÍF |
| Ingun Midjord | TB |
| Margit Joensen | Mjølnir |
| Marjun Kalsø | Mjølnir |
| Miriam Weihe | Dráttur |
| Randi Larsen | ÍF |
| Sóley Philbrow | ÍF |
| Svanna Nielsen | TB |
| Tina Jacobsen | Mjølnir |

Ársins útlendingur

| | |
|---|---|
| Marija Ninkov | ÍF |
| Marina Popovic | TB |
| Mirella Santiago | Dráttur |
| Nikolna Alter | ÍF |
| Zacharina Filipova | Mjølnir |

Ársins venjari

| | |
|---|---|
| Boban Ilic | ÍF |
| Gencho Genchev | Mjølnir |
| Gudrid Nolsø | TB |
| Kristian Mikkelsen | KÍF |
| Niclas Joensen | Dráttur |

## Teir bestu

**Kandidatar-menn**

Ársins áleypari

| | |
|---|---|
| Rúni Weihe | ÍF |
| Bartal Eliasen | ÍF |
| Ragnar Petersen | Fram |
| Trygvi H. Poulsen | Mjølnir |

Ársins blokkleikari

| | |
|---|---|
| Heiðrikkur Bergsson | Fram |
| Jan Áki Olsen | ÍF |
| Kenneth Neshamar | ÍF |
| Ragnar Petersen | Fram |
| Suni Hansen | SÍ |
| Suni Petersen | Fram |
| Trygvi H. Poulsen | Mjølnir |

Ársins verjuleikari

| | |
|---|---|
| Bartal Eliasen | ÍF |
| Eirikur Thomassen | Fleyr |
| Finnur Justinussen | Fram |
| Joen Petur á Stongum | SÍ |
| Rúni Weihe | ÍF |
| Trygvi H. Poulsen | Mjølnir |

Ársins hevari

| | |
|---|---|
| Kaj á Stongum | SÍ |
| Odd Eiliassen | ÍF |
| Bogi Isaksen | Mjølnir |

Ársins stjørnuskot

| | |
|---|---|
| Andrass Jógvansson | Fleyr |
| Eirikur Thomassen | Fleyr |
| Hans Fróði Jensen | SÍ |
| Hanus Elisassen | ÍF |
| Høgni Viderø | Fram |
| Ian Dam | Fleyr |
| Jóan P. á Stongum | SÍ |
| Kaj á Stongum | SÍ |
| Leif á Stongum | Mjølnir |
| Ólavur Jensen | SÍ |
| Tom Vinther | Fleyr |

Ársins leikari

| | |
|---|---|
| Bartal Eliassen | ÍF |
| Joen Petur á Stongum | SÍ |
| Odd Eliassen | ÍF |
| Rúni Weihe | ÍF |
| Suni Hansen | SÍ |
| Trygvi Poulsen | Mjølnir |

Ársins útlendingur

| | |
|---|---|
| Boban Ilic | ÍF |
| Borco Ilic | SÍ |
| Gencho Genchev | Mjølnir |
| Reiko Petrovic | SÍ |
| Romica Øster | Fram |
| Stan Hristov | Mjølnir |

Ársins venjari

| | |
|---|---|
| Boban Ilic | ÍF |
| Borco Ilic | Sí |
| Claudio Pitigoi | Fleyr |
| Gencho Genchev | Mjølnir |
| Reiko Petrovic | SÍ |
| Romica Øster | Fram |